# um broytast

at hesar hava verið ætlaðar leingi.

### Orøkirnar finnast í bygnaðinum

Orsøkirnar til, at Listasavnið er blivið ov kommersielt og at tað er endað í eini støðu, har savnsleiðarin ikki er listfrøðingur, hóast hetta var kravt, tá starvið varð lýst leyst, heldur Tróndur Patursson er at finna í sjálvum bygnaðinum. Hann metir tað ikki vera eina góða loysn, at Listasavnið er sjálvsognarstovnur samstundis, sum tað er tjóðsavn.

Grundin til, at Listasavnið er sjálvsognarstovnur er finna afturi í nítiárunum, tá Listasavnið varð útbygt.

Í 1948 setti Løgtingið Alment Føroyskt Listasavn á stovn, og seinni varð hesin lagdur saman við sjálvsognarstovninum Føroya Listasavn, sum vit fingu í 1989, og samanlagdi stovnurin helt fram sum sjálvsognarstovnur.

### Bygnaðurin broyttur av peningaligum orsøkum

Stórir grunnar sum t.d. Veluxgrunnurin og Augustinusgrunnurin stuðlaðu byggingini. Slíkir grunnar plaga ikki at stuðla beinleiðis tjóðarsøvnum, og tí vórðu viðtøkurnar broyttar. Tróndur Patursson metir ikki, at hesir grunnar høvdu havt nakað ímóti í dag, um bygnaðurin varð broyttur á savninum og setanar- og myndugleikaviðurskiftini blivu øðrvísi. Hetta havði tó kravt samráðingar við grunnarnar.

– Kravið er, at ein listfrøðingur skal vera settur í fast starv og skal leggja ta listaligu linjuna. Orsøkin hjá mentamálaráðharranum, Jógvani á Lakjuni, til, at hann ikki segði seg kunna leggja seg út í, at ein leiðari varð settur, sum ikki var listfrøðingur og harvið ikki uppfylti krøvini í umsóknini, var, at talan var um sjálvsognarstovn, og tí avgjørdi nevndin, hvør skuldi setast. Men vit mugu ikki gloyma, at landið letur 2,6 milliónir um árið til lønir og rakstur. Tvs. at myndirnar á Listasavninum eru fólksins ogn. Landsstýrismaðurin átti at kravt eina lógarbroyting, tí hann kann ikki forsvara, at ein sjálvsognarstovnur umsitur landsins ogn. Ein klokka átti at ringt hjá politikarunum, tá 12 fólk taka seg burtur úr, og teir áttu at funnið eina loysn, sum er virðilig fyri savnið og fyri Føroya fólk.

Eg haldi ikki, at man kann forsvara yvir fyri listafólki, at verkini hjá Mikines ella av Reyni ikki verða umsitin av fakfólki, sum kunnu analysera list, sigur Tróndur Patursson og samanber við eitt nú Fornminnissavnið, har innstilling til stjórastarvið er, og hann heldur, at Listasavnið átti fingið ein líknandi bygnað sum tað, tí so kundi mentamálaráðharrin sum politiskur myndugleiki lagt uppí, um hann ikki var nøgdur við viðurskiftini á stovninum.

### Gløgt er gestsins eyga

Tróndur Patursson hevði einki havt ímóti, um ein útlendskur listfrøðingur varð settur í starv sum savnsleiðari, tí ein slíkur skal hava savnsroyndir og hevur helst meira objektivar metingar enn ein føroyingur vildi havt, sigur Tróndur Patursson, ið enn einaferð staðfestir, at vit ikki kunnu koyra uppá, at nakað er føroysk list. Tí átti at verið lýst í norðurlendskum bløðum eftir listfrøðingi. Seinast søkt var eftir leiðara, varð ikki lýst í altjóða avísum.

Eisini metir Tróndur, at ein skuldi givið sær ta tíð, tað tekur, og um 50 søkja, og eingin teirra er egnaður, so eiga vit at søkja umaftur.

Listfrøðingurin, ið fær starvið, eigur so at fáa eitt árs royndartíð, eins og vanligt er aðrastaðni, og síðani átti viðkomandi at verið áramálssettur, metir Tróndur Patursson.

### Nevndin er ov tilvildarliga samansett

Somuleiðis átti bygnaðurin í nevndini fyri Listasavnið at verið umskipað, um tað stóð til Trónd Patursson. Í nevndini fyri situr eitt umboð fyri Listafelag Føroya, eitt umboð fyri Føroysk Myndlistafólk, eitt umboð fyri Tórshavnar kommunu, meðan Mentamálaráðið eigur formannin, sum hevur tvær atkvøður. Sjálvur heldur Tróndur Patursson, at tann einasti nevndarsessurin, sum er rímiligur, er tann hjá Mentamálastýrinum, tí tað er landið, sum rindar raksturin hjá savninum.

– Harafturímóti kundi tú argumenterað fyri, at vit tólv, sum ikki eru limir í Føroyskum Myndlistafólkum eisini í prinsippinum áttu at havt ein lim, um umstøðurnar ikki vórðu broyttar, nú t.d. Listafelag Føroya, ið er áhugafelag, eigur lim í nevndini, sigur Tróndur Patursson, ið ikki heldur bygnaðin í nevndini vera serliga listaliga trúverdan, sum hann tekur til.

– Tað er ikki nóg gott, at landið bara hevur ein lim, og tí má hetta takast upp politiskt. Øll hava nokk trúð, at hetta var eitt tjóðsavn, og tað trúði eg eisini, sigur Tróndur Patursson, ið minnir, at listin er ung í Føroyum.

– Vit hava stór virði, sum eru skapt upp á stutta tíð, men vit skulu ikki bara hugsa um fortíðina, men eisini um framtíðina, sigur Tróndur Patursson, tá hann hugsar um hvønn leiklut Listasavnið eigur at hava í samfelagnum.

Spurdur, hvat hann metir avleiðingarnar vera, um verandi støða sleppur at halda fram, sigur hann:

– So fellur trúvirðið. Savnið kann ikki liva við, um 12 listafólk halda seg burtur. Fyrr ella seinni fer altjóða pressan at blanda seg upp í, og hon hevur longu víst áhuga.

*Tróndur Patursson er limur í 12-mannabólkinum, men leggur dent á, at sjónarmiðini eru hansara egnu.*



# Blaðið til sølu

BLAÐSØLA

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*– Tað er ikki uppgávan hjá Javnaðarflokkinum at eiga og reka fyritøkur. Nú kunnu vit savna okkum um at føra politikk, sigur formaðurin*

Sum smádrongur gekk hann hús úr hús á Tvøroyri og seldi Sosialin – og nú, sløk fimmti ár seinni, selur hann aftur Sosialin.

– Tað er við blandaðum kenslum, at vit, aftaná 80 ára samstarv, selja blaðið, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, og greiðir frá, at limir og veljarar nú mugu ásanna, at flokkurin er komin til eitt vegamót, og at nútíðin og menningin av blaðnum krevja, at eigaraviðurskiftini verða broytt.

– Um blaðið skal menna seg frítt, er neyðugt, at vit sleppa tí. So tað er í eins stóran mun í kærleika til blaðið, at vit ganga nútíðar krøvum á miðlaøkinum á møti, og vit eru sannførd um, at sølan bert fer at gagna blaðnum.

– Leiðslan og starvsfólkini á Sosialinum hava prógvað, at tey eru før fyri at reka fyrrverandi vindeyga hjá Føroya Javnaðarflokki víðari við kærleika og virðing, sigur formaður floksins. Og hann staðfestir, at sølan eisini leysgevur orku og pening í flokkinum, sum kann verða nýttur til at menna og modernisera felagsarbeiðið í flokkinum, samstundis sum veruleikin hevur prógvað, at tað í dag ber at reka ein flokk, uttan at eiga eitt málgagn.

– Tað er ikki uppgávan hjá Javnaðarflokkinum at eiga og reka fyritøkur. Nú kunnu vit savna okkum um at føra politikk, sigur formaðurin við sorgblíðni.

## Sosialurin til sølu

**Á floksleiðslufundi leygardagin tók Javnaðarflokkurin avgerð um ætlaða sølu av Sosialinum**

SØLA

*Jákup Mørk*

Javnaðarflokkurin hevur í dag sent út tíðindaskriv, har flokkurin sigur seg fara undir eina sølu av fyritøkunum, Sp/f Sosialurin og Sp/f Húsið. Millum annað verður sagt soleiðis í skrivinum, sum er sent fjølmiðlunum í dag.

Høvuðsvirksemið hjá Sosialinum hevur síðani byrjan í 1927 verið siðbundna blaðútgávan. Við stóru broytingunum á fjølmiðlamarknaðinum seinastu árini, eru virkisøkini tó vorðin alt fleiri í tali.

Menningin av fyritøkuni hevur seinni árini verið positiv. Bæði fíggjarliga og innihaldsliga, har vørurnar hjá blaðnum eru vorðnar eitt alt meira týðandi íkast til ein fjølbroyttan føroyskan fjølmiðlamarknað. Men tað er ein sannroynd í dag, at tilknýtið til ein politiskan flokk kann vera avmarkandi fyri virksemið hjá Sosialinum framyvir.

Tað er í tíðarinnar anda, at fjølmiðlarnir skulu vera frælsir og óheftir. Hetta hevur eisini eyðkent menningina av Sosialinum, sum í fleiri ár hevur virkað óheftur av politiskum áhugamálum hjá ánaranum.

Ein loysing frá ánaranum vil í stóran mun vera ein fortreyt fyri, at fyritøkan kann halda áfram við teirri positivu menning, sum hon hevur verið fyri seinnu árini.

Ásannandi hetta hevur Javnaðarflokkurin tikið avgerð um at selja Sp/f Sosalurin og Sp/f Húsið.

Tætta tilknýtið millum Sp/f Sosialin og Sp/f Húsið er orsøkin til, at Javnaðarflokkurin hevur avgjørt at selja bæði feløgini.

Við atliti til m.a. at tryggja fjølbroytni og óheftni á føroyska fjølmiðlamarknaðinum tilskilar Javnaðarflokkurin sær til eina og hvørja tíð rætt til at góðtaka ella vraka eitt og hvørt boð..